

***BUDDHA AV VIÐAREIÐI.*** *Undir fyrstu viðgerð av fíggjarlógini helt fíggjarmálaráðharrin speiskliga fyri, at fíggjarnevndin eftirhondini hevur fingið ein "religiøsan status". Nú telvar maktfulla løgtingsnevndin um tølini fyri 2010, og við endan situr sterki formaðurin Anfinn Kallsberg*

TEKNING: ÓLI P.

Ein onnur atfinning hjá fíggjarnevndini snýr seg um, hvussu fíggjarmálaráðið hevur bólkað játtanir í rakstur og íløgur. Bæði Torbjørn Jacobsen, Anfinn Kallsberg og Magni Laksáfoss vísa á, at fíggjarmálaráðið hevur flutt fleiri rakstrarútreiðslur yvir á íløgusíðuna. Hetta er í stríð við nýggju játtanarskipanina, og tí kunnu reellu rakstrarútreiðslurnar gerast væl hægri, enn roknistykkið hjá Eidesgaard ber boð um.

## Kallsberg ávarar

Samanumtikið valdar stór óvissa rundanum fíggjarlógina fyri 2010, tí uppskotið hjá landsstýrinum er tengt at politiskum avgerðum, sum enn hanga í leysum lofti. Limirnir í fíggjarnevndini kvíða fyri, at hallið verður størri og samtyktu karmarnir væl og virðiliga sprongdir, tá politiski mjørkin lættir sær á, og tá fortreytirnar fyri fíggjarlógini eru greiðari. Og sjálvur ásannaði Jóannes Eidesgaard eisini í tinginum í vikuni, at tað verður trupult at halda ásettu karmarnir í ólavsøkupakkanum.

Anfinn Kallsberg ivast ikki í einum turbulentum politiskum heysti, og stóri spurningurin er, hvørja linju fíggjarnevndin fer at leggja. Fer hon at loyva, at hallið veksur við omanfyri hundrað milliónum? Ella fer hon at hvessa sær spariknívin og syrgja fyri, undirskotið ikki verður enn størri?

Næstforkvinnan í fíggjarnevndini, Eyðgunn Samuelsen úr Javnaðarflokkinum, sigur seg ikki stuðla ov stórum inntrivum í fíggjarlógaruppskotið hjá Eidesgaard, eisini um hallið verður størri, enn budgettið hjá hennara floksformanni vil vera við.

– Í løtuni hava vit onga trygd fyri, at øll tiltøkini í ólavsøkupakkanum verða samtykt. Tí mugu vit vera opin fyri, at hallið verður størri, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Men hesir tónar hóva ikki formanninum í fíggjarnevndini. Fyri Anfinn Kallsberg er fremsta búskaparpolitiska uppgávan nú at tálma vøkstrinum í almenna rakstrinum og um neyðugt at spara eksisterandi funktiónir burtur, so hallið ikki veksur.

– Vit hava eitt hall á 767 milliónir krónur. Um vit ikki fáa tamarhald á vøkstrinum í almennu útreiðslunum, og um vit framhaldandi skulu fíggja okkara samfelag fyri læntar pengar, so verða tað skjótt onnur enn vit sjálvi, sum koma at seta treytirnar. Tað hava vit roynt áður, tað uppliva íslendingar í hesum tíðum, og ta støðuna mugu vit ikki koma í, sigur Anfinn Kallsberg.

– Tí eigur fíggjarnevndin treytaleyst at halda seg til samtykta karmin, og tí mugu vit ikki byrja at slaka í krøvunum til okkum sjálvi, slær Kallsberg fast.

Hann heldur tað vera ov tíðliga at siga nakað um ítøkilig inntriv, tí fíggjarnevndin hevur framvegis ikki gjøgnumgingið uppskotið konto fyri konto. Men hann er til reiðar at spara, um ymsu sparitiltøkini í ólavsøkupakkanum ikki gerast veruleiki.

## Hvør hevur valdið?

Í dag, fríggjadagin, er samgongufundur, og Anfinn Kallsberg vónar at fáa nærri boð um, hvat landsstýrið hevur í kvittanum. Higartil hevur hann ikki verið serliga imponeraður av leiðsluni í Tinganesi, sum eftir hansara tykki als ikki hevur gjørt neyðuga politiska fótarbeiðið.

– Eg havi ongantíð upplivað so avmarkaða politiska viðgerð í samgonguni, áðrenn landsstýrið hevur lagt fram eitt fíggjarlógaruppskot, sigur Anfinn Kallsberg.

Fíggjarmálaráðharrin skilir als ikki kritikkin frá Kallsberg og heldur, at sjáldan hevur tilgongdin verið so nærløgd sum í ár við óteljandi fundum í lítlu samgongu.

– Trupulleikin hjá Anfinni er, at hann hevur start seg blindan uppá eina ávísa konto, nevniliga tunlarnar norður um Fjall, sum landsstýrið hevur strikað í ársins uppskoti, svarar Eidesgaard aftur.

Jú, tunlarnir norður um Fjall eru framvegis partur av dagsskránni hjá Kallsberg. Víst skulu vit spara, men vit skulu eisini gera íløgur, og sambært fíggjarnevndarformanninum hevur ársins íløgukarmur saktans rúm fyri tunlunum á hansara politiska heimabeiti. Nógv bendir á, at hetta verður meiri enn trupult at fáa ígjøgnum, tí rákið í løgtinginum tykist vera ímóti stórum íløgum í tunlar, sum binda landskassan fyri hundraðtals milliónir komandi árini.

Samgongan gongur nú eini turbulentari tíð á møti, og eyguni eru vend ímóti telvingini í fíggjarnevndini. Einans tíðin fer at vísa, um nevndin aftur í ár kemur út sum ein samlað rødd, ella um nevndin býtir seg sundur í meiriluta og minniluta. Við borðsendan situr Anfinn Kallsberg, sum longu hevur brett upp um ermar.